H71-KÍF 22-20 (11-10):

# Mundu mist oddasessin

**Hoyvíkingarnir vóru um reppið at missa trygga leiðslu, tá KÍF noktaði at geva seg í vonleysari støðu**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Er tað nakað, sum hevur eyðkent avrikini hjá KÍF seinastu nógvu árini, so man tað vera stríðsviljin. Ein stríðsvilji, sum núverandi venjarin hjá liðnum, Vagnur Johannesen, í mangar mátar var eksponentur fyri. Og sum hann nú eisini roynir at yvirføra á spælarar sínar.

Tað gav at bíta, tá KÍF fyri viku síðani vann útidystin móti StÍF, og tað var um reppið, at tað eisini gav úrslit, nú kollfirðingarnir tókust við oddaliðið, H71.

Talan var fyri tað nógva um ein javnan dyst, har hoyvíkingarnir tó tóktust hava munin. Men rættiliga leysir sluppu teir ikki av álvara. Í seinna hálvleiki kom tó meira glið á, og tá gestirnir eina langa løtu spældu við einum manni í undirtali, tóktist hetta gerast avgerandi vendin í dystinum. Hoyvíkingar vunnu sær ein fyrimun á seks mál, og við bara 12 minuttum eftir á talvuni, kundi hetta mest sum ikki kiksa.

Tað gjørdi tað heldur ikki - men tað var nær við. Oddafiskarnir steðgaðu mest sum fullkomuliga upp seinastu løtuna. Kanska tí teir kendu seg ov vísar í sigrinum. Ella kanska tí teir gjørdust bilsnir av áhaldandi stríðsviljanum frá mótstøðuni.

Seinastu fimm minuttirnar gjørdist spenningurin mest sum ov nógv av tí góða fyri heimaáskoðararnar, sum sóu munin minkað niður í tvey mál. Við at taka eitt time-out fekk Hannis tó frið yvir sínar menn, soleiðis at seinasti minutturin varð koyrdur heim uttan tað heilt stóra hóvastákið.

Við sigrinum hildu hoyvíkingar fast um oddasessin, har teir framvegis hava vestmenningar undir liðini á sær.

## FAKTA UM DYSTIN

**H71-KÍF 22-20 (11-10)**
**Málskjúttar**
**H71:** Piti Negru 6, Halgir Dahl Olesen 5, Tróndur Vatnhamar 4(2), Johnny Durhuus 3, Bjarni Sørensen 2, Niels Viggo Niclasen 2
**KÍF:** Arnbjørn Hansen 5(1), Damir Oros 5(1), Karl Jóhan Djurhuus 4, Teitur Joensen 2, Gert Hansen 2, Mirko Milinkovic 1, Petur Martin Poulsen 1
**Brotskøst:** H71 2, KÍF 4
**Útvísingar:** H71 1, KÍF 4
**Dómarar:** Kristian Johansen & Sámal Paulason




*Hóast kollfirðingarnir her hava takið á Jakob Jónsson, so eru hoyvíkingarnir framvegis oddalið í Atlantic Airways-kappingini í hondbólti*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Eriksson dregur vikublað í rættin

Enski landsliðsvenjarin Sven-Gøran Eriksson hevur stevnt enska vikublaðnum News of the World, eftir at blaðið hevur kunngjørt eina samrøðu millum Eriksson og ein av tíðindamonnum blaðsins, ið var ílatin sum ein arabiskur oljusjeikur

Blaðmaðurin billaði Eriksson inn, at hann var ein ríkur arabiskur oljusjeikur, sum hevði ætlanir um at keypa Aston Villa, og hann bjóðaði Eriksson starvið sum venjari í felagnum hjá sær, tá handilin einaferð varð endaligur.

Á fundinum teirra millum segði Eriksson eisini mangt og hvat um teir ensku landsliðsleikararnar, sum er fallið fleiri teirra fyri bróstið. Eitt nú segði Eriksson, at Michael Owen ikki var nøgdur við tilveruna í Newcastle, og at hann fegin vildi finna annað felag.

Øll samrøðan teirra millum er prentað í News of the World, og tað hevur givið Eriksson stórar trupulleikar, nú hann skal vísa aftur og greiða frá øllum teimum óhepnu úttalilsinum.

Advokaturin hjá Eriksson metir, at hetta er greitt brot á privatlívið hjá enska landsliðsvenjaranum, og at fleiri av úttalilsum hansara eru tikin út úr samanhanginum.

**-SíS**

## Evnaríkur unglingaleikari til Arsenal

Ein tann evnaríkasti unglingaleikarin í Onglandi, Theo Walcott, hevur gjørt sáttmála við Arsenal

Walcott er bert sekstan ára gamal, og fleiri feløg lógu framvið at keypa hann, men tað gjørdist nú Arsenal, ið drógu longsta stráið. Chelsea hevur eisini víst áhuga fyri Walcott, men hann metti, at hann best kundi menna síni evnir í Arsenal.

Samlaði prísurin fyri Walcott kann gerast 130 milliónir krónur (12 milliónir pund), um hann gerst fastur leikari á besta liðnum hjá Arsenal, og um hann verður úttikin til enska landsliðið. Fyri fyrst hevur Arsenal latið fimm milliónir pund, men væntandi skulu teir av við minst tvífalt so nógv seinni.

Meðan Walcott og Wenger fegnast um nýggja sáttmálan, iðrar stjórin í Southampton seg um at hava mist ein so evnaríkan leikara. Hóast Southampton hevur fingið heilt fitt av peningi fyri Walcott, var tað ongantíð ætlanin hjá teimum at selja hann so tíðliga.

**-SíS**

## Stórsigur uttan Claus

Claus Bech Jørgensen var ikki við á liðnum hjá Coventry, tá teir um vikuskiftið vunnu stórsigur á Derby.

Ikki minni enn 6-1 gjørdist úrslitið, og styrkti hetta myndina av Coventry sum einum liði, ið við stórum fetum er á veg burtur frá niðurflytingarstríðnum, sum fyrsta langa partin av árinum var ein hóttan.

Tað var tó ikki fyrr enn í seinna hálvleiki, at Coventry veruliga fekk gongd á. Derby hevði longu eftir einum minutti lagt seg á odda, men fyri steðgin hevði Coventry vent hesum til 2-1. Seinnu trý korterini var tó eingin ivi. Við fýra málum rað fekk Coventry tær heilt stóru yvirskriftirnar fram, meðan Derby hinvegin alt meira líkist einum møguligum niðurflytara.

**-mørk**

## Skattavaldið eftir donskum fótbólti

Danska skattavaldið er av álvara farið í herna móti illgrunanum, sum leingi hevur verið vendir móti danska fótbóltsheiminum.

Higartil eru 12 feløg løgd undir sjóneykuna, og sambært donskum miðlum eru skeivleikar at finna í roknskapinum hjá øllum hesum feløgum.

Fýra superligufeløg eru higartil kannað, og øll hesi fáa nú ætlanarskriv við skattligum broytingum. Millum feløgini, sum eru kannað, er AaB, har Jón Rói Jacobsen og Súni Olsen spæla.

Umboð fyri danska skattavaldið sigur við DR, at tey fyribils hava lagt ætlanir um at gera eftirlit hjá 36 feløgum.

**-mørk**